# Heini Joensen í bestu donsku deildini

**Team Midtsjælland, sum júst er flutt upp í bestu donsku hondbóltsdeildina hevur styrkt um hópin við føroyska landsliðsleikaranum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Heini Joensen sleppur av álvara at royna seg í heyst, tá hann skal spæla í bestu donsku deildini*

Eftir eitt ár í næst bestu donsku deildini, har hann hevur leikt við Ejby, hevur Heini Joensen nú tikið eitt stórt fet framá. Komandi ár verður hann nevnliga at síggja í bestu donsku deildini, har júst uppflutta TMS hevur boðið føroyinginum sáttmála.

Venjarin hjá TMS, Flemming Oliver Joensen, sigur seg leingi havt eitt ynski um at styrkja hópin við einum lámi, og tí var hann ógvuliga fegin um styrkin, tó at hann eisini viðgongur, at hann vildi havt ein meira royndan leikara.

- Eg haldi at Heini hevur stórar møguleikar, men hann er eisini ein »ófærdigur« leikari, sum framvegis hevur nógv at læra. Fyrst og fremst eru styrkir hansara skot- og gjøgnumbrotsstyrkin, men hann hevur eisini evnini at spæla inn á strikuna, so vit skulu nokk fáa nakað burturúr honum. Ikki minst tí vit á liðnum hava tørv og skotsterkum leikarum, so vit í størri mun kunnu hótta útifrá, sigur venjarin við Dagblaðið í Køge.

Hesin Flemming Oliver Joensen hevur annars í aðrar mátar havt samband við føroyskan hondbólt. Tað vísur seg nevnliga, at Hanus Joensen, sum er pápi Heina, eitt skifti var liðfelagi við Flemming í Stadion.

Nýggja felagið hjá Heina flutti sum nevnt upp í bestu donsku deildina í ár. Higartil hevur felagið styrkt um hópin við trimum nýggjum leikarum, og sagt verður, at tað fyrst og fremst verður á heimavøllinum, at neyðugu stigini til hetta skulu finnast. Her hevur TMS ikki tapt nakran dyst síðani februar mánað í 1999.

## Føroyski ratinglistin

**Topp 25:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | John Arni Nilssen FM | HT | 2402 |
| 2 | Flóvin þór Næs FM | HT | 2313 |
| 3 | John Rødgaard IM | VT | 2268 |
| 4 | Martin Poulsen | HT | 2265 |
| 5 | Heini Olsen FM | KTF | 2261 |
| 6 | Ólavur Simonsen | KTF | 2248 |
| 7 | Eyðun Nolsøe | KTF | 2244 |
| 8 | Hans Kristian Simonsen | KT | 2224 |
| 9 | Rógvi W. Rasmussen | HT | 2201 |
| 10 | Carl Eli Nolsøe Samuelsen | HT | 2187 |
| 11 | Jens Kristian Hansen | TT | 2185 |
| 12 | Jóan Hendrik Andreassen | HT | 2162 |
| 13 | Olaf Berg | HT | 2159 |
| 14 | Heini Danielsen | SF | 2153 |
| 15 | Torbjørn Thomsen | KT | 2148 |
| 16 | Bogi Ziska | TT | 2129 |
| 17 | Rani Nolsøe | KTF | 2103 |
| 18 | Steintór Rasmussen | KTF | 2096 |
| 19 | Martin Brekká | TFS | 2084 |
| 20 | Torkil Nielsen | ST | 2069 |
| 21 | Finnbjørn Zachariassen | TFS | 2066 |
| 22 | Terji Petersen | KTF | 2061 |
| 23 | Finnbjørn Vang | KTF | 2013 |
| 24 | Haldur Suni Johansen | HT | 1990 |
| 25 | Wille Olsen | KTF | 1975 |

John Rødgaard luttók í einari IM-kapping í Gausdal í mars/apríl, sum ikki er dagførd á hesum ratinglistanum. Listin er heintaður frá www.faroechess.com. Eftir at eg sjálvur havi roknað úrslit hansara út, missur hann umleið 34 ratingstig og eigur tí av røttum at hava uml. 2234 á feskasta listanum.

**- cens**

# EM í Istanbul

**Útvið 300 telvarar telva í hesum døgum um Evropeiska meistaraskapin í Istanbul. Tvey umfør resta í og javnt er í toppinum.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

EM er lutfalsliga ein ung og nýggj kapping. Í 1999 varð fyrstu ferð telvað um heitið. Tíverri hava absoluttu heimselitutelvararnir, eitt nú Kasparov, Kramnik, Anand og Leko, ikki luttikið, men í ár er kappingin øgiliga sterk við tveimum 2700-telvarum. Ivanchuk og Grischuk.

Talan er kanska um sterkastu opnu kappingina nakrantíð. Øll telva í einum og sama bólki við yvir 150 stórmeistarum. Hálvtrýðs telvarar hava yvir 2600 í rating, og er tað óhoyrt nógvir í somu kapping. Til samanberingar kann nevnast, at í Politiken Cup í Keypmannahavn, eru vanliga eini 10-15 telvarar við 2550+.

### Dani við í toppinum

Níggju umfør eru leikt, og ikki óvæntað eru nógvir um boðini tá fyrsta pláss viðvíkur. Stóra mongdin og tættleikin í styrki viðførir ein nátúrligan javnvág. Nógvir skjótir javnleikir eru orsakað av drúgvu kappingarlongdini. Ellivu umfør og bara ein frídagur kann stjala nógva orku. Eitt ella tvey skjót talv kann savna kreftirnar aftur hjá tí einstaka, hóast at hesir skjótu javnleikirnir als ikki eru væld ámdir millum talvfjepparar og fyrireikarar.

Maðurin við tí langa og heldur úttaluringa navninum, Zurab Azmaiparashvili (2678) úr Georgia, er einsamallur á odda við sjey stigum, nú tvey umfør resta í. Síðani hava fýra telvarar hálvtsjeynda stig, eitt nú Grischuk. Sterkasti norðurlendingur í løtuni, Peter Heine Nielsen, hevur saman við mongum øðrum seks stig. Peter Heine hevur seinastu tvey árini verið sera vælkoyrandi, og ætlar sær meira enn síni 2625 ratingstig siga okkum.

Heldur skuffandi hevur Ivanchuk bert hálvtsætta stig, eins og Sokolov bert hevur fimm stig. Teir hava tó báðir tvey umfør at vinna sær nøkur fleiri stig.

Topp 50 fáa fríbillet til næstu HM knockoutkappingina.

### Sokolov vann í Sarajevo

Ivan Sokolov vann krútsterku kappingina í Sarajevo, Bosnia Herzegovina, hálvt stig ovari enn tríggir aðrir jagstrarar, harav topp 10-telvarin Alexei Shirov. Kappingin endaði fyri viku síðani.

Sjálvt um Sokolov, sum nú býr og umboðar Holland, eftirhondini er vorðin gamal í garði við sínum 34 árum, er talan í roynd og veru um eitt elitugjøgnumbrot. Ratingtal hansara førkar seg alsamt nær 2700-markinum. Undan kappingarsigrinum hevði Sokolov 2677 ratingstig.

Tað er ikki ein og hvør, ið kann reypa um at hava lagt bæði Shirov (2734 ratingstig) og Bareev (2733) afturum seg í somu kapping. Ei heldur stórtalentið Radjabov megnaði at fylgja við Sokolov.

Endaliga støðan í toppinum: Sokolov 6,5 av 9 (einki tap), Shirov, Kasimzdhanov og Macieja allir við 6 stigum, Radjabov 5 stig.

### FM-snar verður 5. juli

Síðani ár 2000 hevur Føroyameistaraskapurin í snartalvi verið leiktur fyrsta vikuskifti í juli mánaða. Í ár verður telvað leygardagin 5. juli í Havn. Havnar Telvingarfelag hevur á hvørjum ári síðani ár 2000 staðið fyri væld ámdari FM-snarkappingini.

Seinastu tvey árini hevur John Rødgaard vunnið leikandi lætt heitið. Tó er altíð tungt at vera favorittur og vita at allir vilja vinna á sær. Hinvegin er Rødgaard ein kaldur og effektivir snartelvari, og hevur harumframt vunnið Danmarksmeistaraheitið í snartalvi í sjeytiárunum!

Á www.faroechess.com koma seinni heintir upplýsingar.

### FM-vinnarararnir síðani 2000:

2000: Finnbjørn Vang
2001: IM John Rødgaard
2002: IM John Rødgaard
2003: ?



# Tað søgdu tey eftir Hannover



Nú eru tað týskarar, sum vitja hjá okkum. Fyri hálvum ári síðani var støðan hin øvuta, og tá vóru tað mong, sum tóku sær nær, hvussu hóvligir og ikki minst stuttligir teir føroysku áskoðararnir vóru.

Úrslitið var eisini okkum til miklan sóma, tí hóast týskarar fingu tey trý stigini, sum teir høvdu fyri neyðini, so vóru tað føroyingarnir, sum fingu størstu klappini, tá dysturin var liðugur.

Tað ferðina fingu vit nakrar tøkkir sendandi, sum helst vóru ætlaðar øllum teimum, sum onkursvegna høvdu funnið fram til dystin, og niðanfyri prenta vit, hvat formaðurin í Deutsch-Färöischer Freundeskreis, Detlef Wildtraut, skrivaði um dystin:

### Rós til føroyingar

Gott lag, men eingin ófriður, søgdu týskarar um atburðin hjá føroyingum í Hannover tann minniliga 16. oktober.

Ein mikudag í oktober mánaði í fjør var eg í Hannover saman við átta øðrum limum okkara felag. Vit sótu mitt í føroyingarblokkinum og høvdu eitt tríggjar metrar langt band við tekstinum: Deutsch-Färöischer Freundeskreis e.V. og niðriundir: Týskt-Føroyskt Vinafelag. Nú eri eg eingin fótbóltsfagnari og til stóra sorg hjá soni mínum havi eg enn ongan fótbóltskamp sæð til enda. Men hetta var eitt stórt upplivilsi. Eg hevði tað stóra føroyska skipsflaggið, sum eg keypti í Havn í september, og eg veittraði so dúgliga við tí, at hini mundu halda, at eg var ein ektaður føroyskur fosturlandsvinur. Sjálvt um hýrurin var óførur, var alt friðaligt bæði fyri og eftir dystin. Har var einki rok ella stríð, sum so ofte tá fótbóltur er. Teir føroysku spælararnir hava eisini vunnið sær nógva vælvild millum týsk fótbóltsfólk. Tá ið tað føroyska liðið fór av vøllinum, tá ið dysturin var av, fekk tað nógv klapp frá týskum áskoðarum, meðan klappini vóru fá til teir týsku spælararnar. Fólk mintust jú, at summir týskir fótbóltsaktivistar høvdu tikið munnin so fullan, at teir søgdu, at kampurin fór at vera ein reinur spadseritúrur við 6 – 8 týskum málum…

Eftir úrslitið í Hannover er áhugin fyri føroyum vaksin nógv í Týsklandi. Tann týska innrásin í Føroyum, sum til alla lukki ikki kom í 1940, fer at koma í døgunum um tann 11. juni 2003 – og hon verður friðarlig. Eg hopi, at teir týsku hooligans fara at halda seg við hús. Og fyri teir týsku áskoðararnar, sum koma, hopi eg, at teir fara at varnast, at tað er nógv annað áhugavert í Føroyum enn fótbóltur.

**Føroyar - Týskland Upphiting**

Upphiting til dystin Føroyar - Týskland verður í nýggja "vertshúsinum" hjá Restorff's Bryggjarí frá kl. 15.00.

Á skránni er ókeypis andlitsmáling, felagssangur, søla av fløggum, turrikløðum, blusum o.ø.

Nýggir limir kunnu tekna seg.

**Skrúðgongan niðan á Tórsvøll verður kl. 19.00.**

12 MAÐUR FAROESE FOOTBALL SUPPORTERS

Restorffs